# So vendi sólin endiliga



Jústinus Leivsson Eidesgaard

Í gjár rendi sólin ímóti, nú sleppur hon ikki longur suður og fyri framman liggja ljósari tíðir til bata fyri sál og fenað. Hóast eini 400 ár eru ligin síðan staðfest varð, at jørðin er ikki er ein fastnegldur knøttur og alt í alrúminum melir kring hana, so situr tað fast enn millum manna, at sólin ferðast suður og norður eftir himinum. Jørðin ferðast eins nógv og sólin, alt ferðast í alheiminum og tað eru bert teir allar klókastu, sum hava skil á hesum meldri, soleiðis eitt sindur.

Men í gjár rendi hon seg í móti, hásummar er á Suðurpólinum og tey hoyggja í New Zealandi. Og hon vísti seg eisini í gjár heima hjá okkum. Myndamaður okkara fór út á Skansan í Havn og læsti hana fasta stutt eftir at hon var risin, meðan hon litaði suðursíðuna á húsunum í Havn við sínum enn veika ljósagula liti.

Sólin reis klokkan 9.55 í gjár, hon stóð í suðri klokkan 12.26 og tá kom hon akkurát upp um Kirkjubøreyni, var tú staddur miðskeiðis í Havnini. Í Tjørnuvík sæst hon slett ikki, teir mugu lata sær lynda at síggja hana skýna á Eiðiskoll. Í Oyndarfirði kemur hon ikki undan aftur niðri í bygdini fyrr enn á nýggjárinum.

Dagurin í gjár var fimm tímar og ein minutt langur, men skjótt gongur rætta vegin. Mikudagin, í gjár stytsta dag og í dag hendir ikki tað stóra. Hesin dagar eru eins stuttir, men longu næsta fríggjadag sæst broyting. Tá er dagurin longdur við sjey minuttum og soleiðis heldur hugaliga gongdin fram heilt fram til 21. juni, tá sólin steðgar á her hjá okkum og ger seg til at ragga suðuraftur. Tá er bítandi frost á Suðurpólinum og á New Zealandi ganga menn og hyggja at hvussu brundarnir uppføra seg.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið





**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi. Skýggjað og møguliga regn og vátaslettingur, men leygarnáttina klárar í. Hitin fellur frá 5 til 2 stig, um náttina niður móti frostmarkinum.





**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og norði. Skýggjað og okkurt kavaæl. Hitin umleið á frostmarkinum.





**Jólaaftan:**
Gul til stívt andøvsgul av norði. Skýggjað og okkurt kavaæl. Hitin beint undir frostmarkinum.

**Jóladagur:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði. Skýggjað við kava og kavaælingi. Hitin millum frostmarkið og 5 kuldastig.

**2. jóladagur:**
Strúkur í vindi upp í skrið. Skýggjað við kava ella kavaælingi og framvegis sami kuldi.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷12 |
| Nuuk | ÷1 |
| Qaqortoq | ÷2 |
| Ammassalik | ÷5 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 9 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 2 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | ÷1 |
| Keypmannah. | 2 |
| Helsinki | ÷5 |
| Moskva | ÷6 |
| Berlin | ÷1 |
| Warzawa | ÷1 |
| Kiev | ÷4 |
| Bukarest | – |
| Paris | 8 |
| Madrid | 7 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 9 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 8 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 0 |
| Miami | 10 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ





Eitt lágtrýst í ein landnyrðing úr Jan Mayen fer móti Norður-Noreg meðan eitt hátrýst yvir Eystur-Grønlandi liggur mest sum í stað.





Rættiliga køld luft rekur komandi dagarnar inn yvir Føroyar av norði.

## HITALAGIÐ





Hitalagið mált frá 20/12 kl. 06⁰⁰–21/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,8°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALL





Avfallið: 4,1 mm – mált frá 20/12 kl. 06⁰⁰–21/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 54,7 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

12. des.: Mánin næstur jørðini
18. des.: Seinna kvarte
25. des.: Tendring
28. des.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Skipalistin 2000

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. des. | 03:49 | 16:14 | 02:49 | 15:14 | 03:04 | 15:29 | 05:49 | 18:14 | 06:49 | 19:14 | 02:04 | 14:29 | 01:04 | 13:29 | 04:04 | 16:29 | 05:04 | 17:29 | 03:34 | 15:59 | 04:49 | 17:14 |
| 23. des. | 04:36 | 16:57 | 03:36 | 15:57 | 03:51 | 16:12 | 06:36 | 18:57 | 07:36 | 19:57 | 02:51 | 15:12 | 01:51 | 14:12 | 04:51 | 17:12 | 05:51 | 18:12 | 04:21 | 16:42 | 05:36 | 17:57 |
| 24. des. | 05:19 | 17:39 | 04:19 | 16:39 | 04:34 | 16:54 | 07:19 | 19:39 | 08:19 | 20:39 | 03:34 | 15:54 | 02:34 | 14:54 | 05:34 | 17:54 | 06:34 | 18:54 | 05:04 | 17:24 | 06:19 | 18:39 |
| 25. des. | 05:58 | 18:17 | 04:58 | 17:17 | 05:13 | 17:32 | 07:58 | 20:17 | 08:58 | 21:17 | 04:13 | 16:32 | 03:13 | 15:32 | 06:13 | 18:32 | 07:13 | 19:32 | 05:43 | 18:02 | 06:58 | 19:17 |